

*Magnus Tausen tekur 1. august í ár við starvinum sum vitanarstjóri í skúlaverkinum*

MYNDIR: ÁLVUR HARALDSEN

fór hugurin til fakfelagsarbeiði at gera um seg.

– Í 2000 vórðu broytingar framdar í eftirlønini, sum vit yngru lærarar vóru ónøgdir við. Hetta hevði við sær, at eg stillaði upp til formansvalið í Føroya Lærarafelag í 2001. Elsa Birgitta Petersen vann valið, og eg gjørdist kassameistari. Í dag fegnist eg nógv um tað. Eg var ikki til reiðar at gerast formaður tá, ásannar hann.

## PISA loypti hvøkk á

Í 2005 var aftur formansval á skránni, og hesaferð varð hann valdur. Nú var hann til reiðar at taka við sessinum og fór til verka at gera Føroya Lærarafelag sjónligari. Málið var enn sum áður at gera vart við korini hjá lærarunum, men ikki bara við at vísa á ónøgd. Hann vildi eisini vísa á loysnir.

– Skalt tú verða tikin í álvara, mást tú hava uppskot um loysnir, og eg haldi eisini, at myndugleikarnir hava havt virðing fyri Føroya Lærarafelag. Vit hava gamaní havt onkrar samanbrestir, men vit hava altíð kunnað sett okkum niður aftaná og tosað saman, sigur Magnus Tausen.

At samskipa sjónarmiðini hjá hundraðtals lærarum er ein avbjóðing. Fólkaskúlin verður ofta umrøddur sum ein eind, men í eindini eru bæði lærarar, ið undirvísa einsamallir á smáum bygdaskúlum, og lærarar, ið undirvísa saman við nógvum øðrum á stórum skúlum. Teirra umstøður eru sera ymiskar.

Ta størstu avbjóðingina fekk Føroya Lærarafelag tó, tá PISA-kanningin rakti fólkaskúlan sum eitt sleggjukast í 2006.

– PISA-kanningin loypti hvøkk á alla skúlaskipanina og eisini

> Skalt tú verða tikin í álvara, mást tú hava uppskot um loysnir

politikararnar, men hon var eitt gott høvi at seta skúlaskap á breddan og fáa orðað ítøkilig mál fyri skúlan. Ein bólkur varð settur niður við umboðum fyri Mentamálaráðið, Lærarafelagið, foreldur og kommunurnar, og arbeiðið í hesum bólki var eitt tað besta, eg havi verið við í, tí kjakið var sera opið og gevandi, sigur Magnus Tausen.

## Savna alla vitan

Nógvar ítøkiligar ábøtur komu burtur úr arbeiðinum, ið sett varð í verk. Fleiri undirvísingartímar vórðu játtaðir, Føroya Skúlabókagrunnur fekk hægri játtan at gera fleiri undirvísingarmiðlar, lættlesibøkur sum tær væl umtóktu Krabbabøkurnar vórðu givnar út, og sjøtul varð settur á at útbúgva lærarar sum lesivegleiðarar.

– Politiska viljanum at fremja átøkini bagdi onki. Landsstýrisfólk sum Jógvan á Lakjuni og Helena Dam á Neystabø hava gjørt sítt, men trupulleikin nú er, at átøkini, ið sett vórðu í verk, verða bumbað niður við sparingum. Hetta er ørkymlandi at síggja, tí vit enda á sama støði sum áðrenn PISA-kanningarnar, sigur Magnus Tausen og ásannar, at viðhvørt røkka pengarnir bara ikki.

Kortini fer hann við góðum treysti undir at samskipa KT-depilin, Skúlabókagrunnin og Landsmiðstøðina í ein sterkan vitanarstovn, tí hetta er upplagt at gera, heldur hann. KT-skipanirnar kunnu ikki vera leysar av skúlabókunum, og skúlabøkurnar kunnu ikki vera leysar av ráðgevingini á Landsmiðstøðini.

– Avgerandi í samanleggingini er, at alt tað nógva virksemið, sum stovnarnir longu hava, ikki verður órógvað, tí tað er so grundleggjandi. Vit skulu hava øll starvsfolkini at húsast í somu lon, sameina arbeiðsgongdir og skapa ein leiðslubygnað. Síðan skulu vit knýta innihaldið í stovnunum saman í undirvísingarportalin, SNAR. Eg vóni at fáa Føroya Læraraskúla, Fróðskaparsetrið og aðrar vitanarstovnar við í hetta arbeiðið, so SNAR verður ein spennandi kelda til alla vitan hjá føroyingum heima sum úti, sigur Magnus Tausen.

### FAKTA **MAGNUS TAUSEN**

**Navn:** Magnus Tausen
**Føddur:** 1. juli 1971
Giftur við Sóleyð í 1995
5 børn - 12, 11, 8, 6 og 3 ár
Skrivstovuútbúgving hjá Shell 1994
**Prógv:** Føroya Læraraskúli 1998
Starv í Kommunuskúlanum 1998
Nevndarlimur Føroya Lærarafelag 2001 og formaður 2005
Frá 1. august 2010 stjóri á Føroya Skúlabókagrunni, Landsmiðstøðini og KT-deplinum